

**Harald Anthoniussen:**

# Gekk burtur við Arizonu

**Hesa ferð fáa vit fyrra partin av frágreiðingin hjá Haraldi Anthoniussen um, tá ið hann var við at ganga burtur við Arizonu í 1932. Hetta er ein sera áhugaverd frásøgn um gongdina frá tí, teir taka botn, enda á einum skeri, fara í bátarnar, stríða seg upp á land, koma í hús, fara á rossabaki til nærmastu bygd og síðan longu leiðina til Reykjavíkar og Føroyar**



*Hetta er manning á Arizonu í 1922. Í aftara rað síggja vit f.v.: Petur Klein, Jóan Frederik í Leynum, Jákup í Horni við Gjógv, Jógvan Garðshorn í Elduvík, Andrass í Streymnesi og Hans Debes bestimaður á Oyrareingjum. Fremra rað: Poul Laksafoss (var við Sæborg), Mikkjal í Tarti, Jákup Sofus við Gjógv, Klæmint Klein, skipari, Johan Sofus Haraldsen, Emil og Andrias í Køkinum, báðir av Sandi. Andrias í Tarti var eisini við, men hann var ikki við á myndini*



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**3. partur**

Henda frásøgnin stavar frá, tá undirritaði Harald Anthoniussen var við Arizonu, sum strandaði við Selvogsnes í Íslandi tann 9. apríl 1932.

## Um Arizonu

Í 1901 keypti Jens Evensen keypmaður og reiðari í Havn saman við Kristiani Jacobsen skipara, á Geilini í Nólsoy, sluppina Arizonu. Arizona var bygd í Rye í Onglandi í 1882 og var 83 tons til støddar og skrásett TN 6. Kristian á Geilini førdi Arizonu til 1917, tá annar nólsoyingur, Johan Danielsen í Lon, loysti hann av og førdi hana í tvey ár. Kristian á Geilini seldi tó longu í 1910 sín hálvpart í skipinum til Jens Evensen, sum soleiðis átti hana einsamallur tey síðstu árini, hon var skrásett í Havn. Í 1919 varð Arizona seld til Johannes Johannesen í Leirvík, Leirvíks Jóannes.

Í 1928 fór Leirvíks Jóannes við Arizonu til Danmarkar at taka dammin úr henni. Henda túrin varð Arizona ásigld og fekk stóran skaða. Hon varð umvæld oman vatnskorpina, og hon fekk eisini motor ísettan. Ein Skandia 45 HK motor. Arizona var skrásett í Leirvík, FD 401, til hon í 1932 fór á land undir Selvogsbjørgunum.

Skiparar á Arizonu vóru annars Kristian í Geilini, Nólsoy, Johan í Lon, Nólsoy, Kristian á Kinn, Lambi og Klæmint Klein úr Oyndarfirði.

Klæmint var føddur 8. juli 1894 í Sjúrðastovu við Gjógv. Tók skiparaprógv í 1918. Førdi White Star í 1918 og 19 og Arizonu hjá Leirvíks Jóannesi í 1920 og 21. Var skipari á Bonetu 1923. Sigldi síðani við øðrum skipum til hann vegna sjúku legðist uppi á landi. Klæmint í Oyndarfirði doyði 25. mai 1938.

Hann var tískil skipari á Arizonu, tá ið Andrias í Tarti, systkinabarn Harald, fór fyrstu ferð til skips í 1921. Andrias var við, áðrenn skipið fekk motor, og meðan tað enn hevði damm. Hesum hevur Andrias greitt frá í FF-blaðnum í 2006.

Jóannes átti eisini Kristionnu og Ortariu. Jóannes og sonurin Kristian gingu burtur undir krígnum við Kristionnu, tá teir fóru niður at selja.

Jóannes hevði handilsvirki í heimbygdini, og hann var ein framúr framburðsmaður, sum dóttir hansara Dora greiddi frá í FF-blaðnum.

Jóannes var eisini skiparalærdur, men hevði vanliga aðrar skiparar til sínu skip. Tveir ungir skiparar í Oyndarfirði høvdu siglt við honum. Teir vóru Klæmint Klein og Sofus Rinkustein. Tí høvdu oyndfirðingar serligan áhuga fyri hesum skipum.



*Modell av Arizonu, mynd er úr Skáanum gjørd av Poul Niclassen í Havn. Hongur í Nólsoyar kirkju*

## Brellið eftir at sleppa til skips

Hetta var í tíðini hjá seglskipunum mitt í 20-unum, tá bert ein vitjan umborð og tað at fáa keks var nóg mikið at fáa brell eftir at sleppa til skips. Serliga dámdi mær at koma umborð á Arizonu, navnið minti meg um okkurt fjart stað langt burturi í heimi.

Tað vóru tó bert 7-8 mánaðir, at eg var hugtikin av hesum skipi. Tá fekk tað ein skipara úr onkari heilt aðrari bygd. Tá kundu reiðarar velja og vraka millum teir mongu skiparalærdu.

Arizona hevði í 1932 fingið munandi umvælingar á skipasmiðjuni í Havn. Hon hevði eisini fingið nýggjan motor og stýrihús. Hesar umvælingar gjørdust meira umfatandi enn ætlað, og tóku meira enn ein mánaða longur enn roknað var við.

Tað var komið til endan á mars mánaði. Hildið var, at nú var sloppið. Men tá hendi á ferðini úr Havn til Funnings eitt óhapp, sum seinkaði fráferðina við enn eini hálvari viku.

Á ferðini komu vit framvið Mjóvanes, og hetta kann vera vandamikið, so streymhart tað er. Hetta gjørdist eisini okkara roynd hetta kvøldið kl 10. Tað var mótstreymur og mysing, so tað rak sera nógv við Mjóvanesi. Her gjørdist sjógvurin so vánaligur, at bjargingarbáturin sleit seg leysan og furaði úr einum borði í annað, áðrenn hann fór til sjós. Hann